# vørvið og fjøltáttar vinnulívið



*- Trygdin undir goymsluni verður undir eftirliti hjá Dátueftirlitinum, og atgongd til savnið krevur góðkenda granskingarætlan, eitt nú av Vísindasiðsemisnevndini og Dátueftirlitinum*



*- Føroyar eru serliga væl egnaðar til henda kanningarháttin við atliti til atkomiligar og neyvar ættarupplýsingar og haldgóðar diagnosur, segði Pál Weihe, granskari, undir framløguni av uppskotinum til lóg gransking av mannaílegum*

inum, har reglur, sum eru galdandi fyri heilsuverkið, eisini verða galdandi fyri Ílegusavnið. Somuleiðis verður stovnurin at fylgja fyrisitingarlógini og fyrisitingarrætti yvirhøvur.

- Ílegusavnið verður ein stovnur í heilsuverkinum, sum skal savna saman og umsita tær tríggjar skráirnar, sum verða í skipanini. Stovnurin skal eisini móti gjaldi gera sáttmálar við granskarar og granskingarfyritøkur um gransking í upplýsingum í skráunum.

Hann segði, at tær tríggjar skráirnar í skipanini verða 1. Vevnaðarskráin, 2. Diagnosuskráin og 3. Ættarbandsskráin.

– Mett verður, at tað fer at taka eitt ár at gera ættarbandsskránna, meðan vevnaðarskráin verður bygd upp so líðandi. Hinvegin kann diagnosuskráin byggjast upp so hvørt.

## Persónsverndin

Pál Weihe nam eisini við persónsverndina og vísti á, at grein 1 í lógini fevnir um "at verja einstaklingin", sum hann tók til.

- Persónsverndin í lógini byggir eitt nú á, at viðurskiftini á økinum verða skipað, krav er um kliniskan ábyrgdarhavara og somuleiðs verður kravt, at lógin um ílegugransking leggur seg undir verjuna í lógini um viðgerð av persónsupplýsingum, undir verjuna í vísindasiðsemislógini og sjúklingarættindalógini.

Aftrat hesum skal nýggja lógin taka hædd fyri grein 10 í OVIEDO-sáttmálanum.

Tað er løgfrøðingurin hjá Almanna- og Heilsumálaráðnum, Kim Pagels, sum hevur tikið sær av tí partinum, ið fevnir um persónsverndina við atliti til altjóða avtalur og sáttmálar.

## Savna við fyriliti

Sambært grein 4 í lógaruppskotinum tryggjar einkarætturin endamálið við Ílegusavninum.

- Uppgávan hjá savninum verður at savna inn upplýsingar við fyriliti sambært vísindasiðsemislógini og persónsupplýsingalógini, og her fer heilsuverkið at samstarva eftir avtalu og samsýning .

Pál Weihe segði, at í stuttum verður uppgávan hjá savninum at útvega, goyma og handfara vevnað og diagnosur hjá persónum, sum eru skrásettir í Føroyum - umframt upplýsingar um ættarbond.

- Trygdin undir hesari goymslu verður undir eftirliti hjá Dátueftirlitinum, og atgongd til savnið krevur góðkenda granskingarætlan, eitt nú av Vísindasiðsemisnevndini og Dátueftirlitinum.

At enda vísti Pál Weihe, granskari á, at revsingin fyri brot á grein 11 í lógini um ílegugransking í fyrsta lagi viðførir, at viðkomandi skal avhenda allar upplýsingar, sum eru savnaðir ólógliga.